## 11 kvinnur og 10 menn stilla upp

**UPPSTILLING**
*Tíðindaskriv*

**Til Bygdaráðsvalið í Nes Kommunu eru tveir listar. Ein við 11 kvinnum og hin við 10 monnum.**

**Tað verður nógv tosað um at kvinnur vilja ikki stillað upp til val, men tann trupuleikan hava vit ikki í Nes Kommunu, siga umboð fyri Tofta Kvinnufelag.**

**11 kvinnur eru uppstillaðar, og tær hava allar játtað at koma á listan, har listarnir ikki eru politiskir.**

**Mikukvøldið skipaði Tofta Kvinnufelag fyri almennari hugnaløtu í fundarhølinum á Vesturskin, lýst varð við sangi práti, og at kvinnuligi valevnini vóru við.**

**Felagssagnur var, og Maria og Ragnfríð úr Tofta skúla spældu 4 løg uppá tvørfloytu, meðan kvinnurnar úr Nebo sungu fýra fleirrøddaðar sangir. Hetta settu sín dám á at fáa eitt hugnaligt kvøld.**

**Høvið var eitt heilsa uppá øll tey 11 kvinnuligi valevnini, fleiri høvdu orðið, og stemningurin var góður. Allar eru tær spentar um, hvørjar nú fara at vinna.**

**FELAGS ÁBYRGD OG AVGERÐ er tað, hesar kvinnurnar ynskja at uppnáa, og tær hava sett sær sum mál at arbeiða fyri:**

- **Ábyrgdarfullum fíggjarpolitikki**
- **Aktivum heilsupolitikki**
- **Betri umstøðum hjá børnunum -barnagarð**
- **Betri frítíðar møguleikum hjá teimum ungu-ungdómshús**
- **Betri trivnaði hjá teimum eldru**
- **Alternativum íbúðarmøguleikum**
- **Framhaldani betri karmum hjá vinnulívinum**
- **Framhaldandi fríðkan og verju av umhvørvinum**
- **Menning av mentunarlívinum**



# Á Toftum riggar sk

**Formaðurin í skúlastýrinum á Toftum metir ikki, at mann skal venda aftur til gomlu skipanina við skúlaráðum, sum Jógvan á Lakjuni hevur róð framundir. – Hjá okkum hevur undirtøka verið alla tíðina, og tað stórur munur á at kolldøma fullkomiliga og at betra um tað, sum er, sigur formaðurin í skúlastýrinum á Toftum**

**SKÚLASTÝRISVAL**
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Í seinasta Vikuskiftis Sosialinum kom fram, at sera lítil undirtøka hevur verið fyri at stilla upp til skúlastýrisvalið. Á summum uppstillingarfundum verið næstan færri fundarfólk enn tað skulu í skúlastýrið. Tað kom eisini fram, at landsstýriskvinnan í mentamálum, Helena Dam á Neystabø, metir, at um undirtøkan er so lítil, so má skipanin takast av ella broytast grundleggjandi. Eisini skeyt Helena Dam á Neystabø upp, at ein roynd kundi verið gjørd, har øll sleppa at velja, men bert foreldur hava valbæri.

Øllum hesum broytingum er Jóhannus Danielsen, skúlastýrisformaður á Toftum, ósamdur við. Tað kundi eisini verið, at hann fyri sín skúla hevur grein í sínum máli, tí har møttu 40 fólk upp til uppstillingarfundin, og hóast formaðurin er keddur av, at tað ikki vóru fleiri, ið møttu, vóru knapt 80 av 200 børnum umboðaði. Tað er nógv størri undirtøka enn í størru plássunum, har útvarpið hjá Kringvarpinum kannaði undirtøkuna.

### Ongin kunning

Formaðurin í skúlastýrinum metir, at høvuðsorsøkin til vantandi undirtøkuna til uppstillingarfundirnar til skúlastýrini, er, at mentamálaráðið síðani 2001, tá nýggja skipanin kom, hevur gjørt millum lítið og onki fyri at halda skipanina viðlíka.

- Tað virkaði sum, at mentamálaráðið síðani 2001 ongan áhuga hevur havt at betra um skúlastýrini. Undirtøkan hevur verið minni enn ætlað alla tíðina, men hevði mann blivið við at viðlíkahildið skipanina, hugt at grannalondunum, og síðani lært av tí hini gera, so hevði støðan heilt víst verið ein onnur, sigur Jóhannus Danielsen. Hann leggur afturat, at tað er ov galið, at einasta fráboðanin frá Mentamálaráðnum, var ein lítil faldari, ið varð sendur í húsini. Onkrastaðni hevur tað tó verðið soleiðis, at faldarin bert er latin næmingunum, sum tey skuldu hava heim við.

- Eg meti, at hevði mann veruliga fingið upplýsing um, hvussu mann kann gera seg galdandi og fingið ávirkan, so hevði munandi størri undirtøka verið millum foreldrini, sigur Jóhannus Danielsen, sum leggur afturat, at Mentamálaráðið eisini kundi stuðla felagsskapinum Heim og skúli, ið hevur verið virkin síðan 2006 eitt sindur betur.

### Áhugin fylgir børnunum

Tá millum onnur Jógvan á Lakjuni nevna, at mann skal venda aftur til gomlu skipanina, har onnur enn foreldur kunnu vera limir í skúlaráðnum, sum tað tá æt. Heldur Jóhannus Danielsen vera burtur úr vón og viti.

- Tað vísir seg sum áhugin